## Nýtt fløgusavn við kingosangi




Upptøkur í Sjóvar Sókn, har trý ættarlið syngja gomul kingoløg, eru nú givnar út á savnsfløgu

Savnið hevur verið ávegis síðan 2003, har Berint uppi í Gerði (1885-1975), sonurin Símun Rasmussen (1933-2005) og Tríggir Kingomenn sungu í fleiri umførum í kirkjunum í Sjóvar sókn. Tiltakið varð sera væl móttikið, men hóast gomlu sálmaløgini vóru úr sóknini, hevði eingin av teimum, sum sangararnir tosaðu við aftaná, hoyrt tey fyrr.

Hetta fekk teir tríggjar kingomenninir at geva serstøku vísukendu løgini út á fløgu. Við hesum vóna teir, at fløgan kann geva onkrum íblástur at nýta okkara fjølbroyttu siðbundnu songløg í egnum tónleikaligum virksemi.

Við teimum fýra fløgunum fylgir tekst- og nótahefti á 40 blaðsíður.

Fløgurnar fáast til keyps í 3´aranum.

Meir fæst at vita á www.123hjemmeside.dk/kingomenn, har fløgan eisini kann bíleggjast.

-ave

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# "Ljósatendring" í Norðurlandahúsinum

**Fríggjadagin letur upp listaframsýningin Ljósatendring í Norðurlandahúsinum, har evnisdagur um listahandverk eisini er á skránni**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*


*Framsýningin verður at síggja til nýggjárs*

Evnisdagurin, sum verður hildin undir heitinum Listahandverk fram í ljósð, byrjar kl. 13 í Klingruni, við fyrilestrum og kjaki.

Bárður Jákupsson, listamaður, setir evnisdagin og hugleiðir um listahandverk í almenna rúminum.

Peder Rasmussen, keramikari, heldur fyrilestur um tað at verða keramikari í útjaðaranum og skula royna at profilera seg úti í heimi. Og Thue Christienasen, projektleiðari, sigur frá royndunum at fáa grønlendskt listahandverk út í heim.

Kl. 15.00 setir Niels Halm framsýningina Ljóstendring, har hesi listafólk eru við:
Peder Rasmussen, keramikk, Danmark
Vígdis Petersen, keramikk, Føroyar
Guðrið Poulsen, keramikk, Føroyar
Ole Jacob Nielsen, træ, Føroyar
Astrid Andreasen, tekstil, Føroyar
Tita Vinther, tekstil, Føroyar

Eftir setanina verður ein lítil konsert, har klavertrioin við Sámali Petersen, violin, Jóhannes Andreasen, klaver, og Tóru Restorff Jacobsen, cello, spælir brot úr klavertrio hjá Mozart og trio hjá Shostakovich.

Øll listaáhugað eru hjartaliga vælkomin. Gløgg verður bjóðað.

Evnisdagurin er almennur, men vendir sær serliga til fólk og stovnar, sum keypa og umsita list í breiðasta merking.

lekkurthártiljóla





Vilt tú hava langt hár í ein dag, ella longri tíð, eru fleiri møguleikar, alt hárið er natúrligt hár, til leigu. Støkk inn á gólvið og fá meira at vita.

Vit bjóða ein frían hárkur við høvurmýking, í sambandi við aðra viðgerð, t.d. liting, reflex, permanent


NÝTT
Vit bjóða leinging av tínum vippum, sum heldur í uml. 3 vikur.


Set hárið til eina festligheit.

Vit bjóða ráð og vegleiðing í pleygu og viðgerð av tínum hári, frítt og óbindandi

Støkk inn á gólvið ella ring, tú ert altíð vælkomin

salong liljan
Torfinsgøta 6 · Tórshavn · Tel 31 47 68



Tak hendan lepan við og fá 10% av viðgerðunum
Bert galdandi viku 46-2005

Sosialurin 341800